»Trúgv uttan gerningar er deyði«

Tað stendur eisini í Halgubók

Í Dagblaðnum Nr. 16 tann 10. febr. 1988, svarar Lydia Arge mær aftur, uppá eitt lesarabræv, eg hevði í 14. Sept. tann 12. des. '87.

Nú er so long tíð gingin síðan hendan skriving byrjaði, so fyri at lesarin skal fáa hylling á hvat hetta snýr seg um, fari eg at endurtaka nakað av tí í fram er farið.

Tað var í november '87, at Lydia Arge skrivaði tvær greinir í Dagbløðunum nr. 131 og 132. um *»ondar maktir«* har einstøk brot vóru so ondsinnaði, helt eg, og vend móti føroyskum sosialistum, at eg helt tað vera átalu vert, havi seinni fingið viðhald frá hópinum av fólki úr øllum politiskum flokkum, so eg standi ikki einsamallur. Hetta fløvar, vóni at Lydia stendur einsamøll við sínum kensluleysu ábreiðslum.

Her eru nøkur brot úr greinunum hjá L.A.

Mangt bendir á, at tann tíðin nærkast, nú vit upplíva ein heim, sum verður plágaður at serliga tveimum øndum maktum, sum nádileyst fremja yvirgang móti stórum pørtum av heiminum og miljónum av menniskjum.

Tað er íslamiska religiónin við sínnisjúkum monnum sum Khomeini og Kadaffi øðrumegin og hatursboðskapur Marx, sum fyri 70 árum síðani varð settur í verk av Lenin, kenslukalt ruddandi alla mótstøðu av vegnum í Ruslandi. Líðingarnar hjá russiska fólkinum hava verið ótaldar síðan.

Her eru vit púra samd, eg havi nevnt aðrar ondar maktir, í svari mínum, sum er prentað niðanfyri, harímillum Botha, sum jú eisini drepur og pínir fólk, ja hann er so ondur, at allur heimurin hevur vent sær ímóti honum. Hesin sami Botha sendi nú í vikuni hermenn sínar inn í annað land, munnu hesir eins og Breshnev sendi sínar hermenn inn í Afghanistan, ikki verða ætlaðir at drepa og kúga onkran? heldur L.A. at presturin Desmond Thuto hevur fingið Nobel heiðurslønina frá kommunistum ella anarkistum. Kundi eisini nevnt Idi Amin, sum píndi og drap túsundatals av ósekum menniskjum, tað gongur jú altíð út yvir ósek. Eg spyrji einaferð enn, vóru hesir muhamedanar ella sosialistar?

Hóast »Sosialistiski Internationali« greitt fornoktar Gud, halda okkara sosialistar fast við, at teirra ástøði byggir á Bíbliu og kristindóm.

— — — —

Stóru øndu maktirnar báðar, sum ráða heimi okkara til nú, Islam og Sosialisman (el. kommunisman), minna meg á sannleikan í Ef. 6.12:

HATSKUR OG SKAÐAFRØÐUR

Grimberg gevur ateistiska Marx hetta skoðsmál, hvørs læru føroyskir sosialistar byggja sítt ástøði á. Lítið rósandi er tað:

— — — —

Tíverri eru alt ov nógvir føroyingar indoktrineraðir av Marx kommunistiska manifesti og »Sosialistiska Internationala«. Ein óføroysk læra, sum ikki hevur havt nakra signing við sær.

Meðan Gorgatjov billar heiminum inn, at »glasnost« hevur gott endamál, eru vit tíbetur fleiri, sum ikki floyma fólkadrápið í Afghanistan, har blóðtíðin hjá hesi øndu megi heldur fram.

Óvist hví hesin sorgarleikur verður tagdur í hel av okkara sosialistum.

— — — —

Hatursboðskapur Marx hevur kostað 60 miljónir mannalív í Ruslandi og aðrar ótaldar miljónir í Vietnam, Kampuchea, Afghanistan, Etiopia o.ø. londum **uttan** *atomvápn.*

Okkara vinstrahallu lata bæði eygu og oyru aftur fyri hesum óhugnaliga sannleika.

Loyvi mær, av góðum grundum, at ivast í hvat tú kennir til føroyska siðalæru, hon hevur í øllum førum ikki verði merkt av hatri og ondskapi fyrr enn nú. Tað gav at býta, at dómsvaldið, sum eindømi, hevur skýrt skrivingina í Dagblaðnum fyri ondsinnaða, og tú skrivar jú í Dagblaðnum.

Síðan til greinina í Dagblaðnum 10. febr. '88.

»Lydia Arge svara John Bertholdsen um ondar maktir«.

L.A er ikki sørt firtin um, at eg, við góðari meining, havi roynt at vegleitt hana, aftaná at hon í langa tíð, við skriving sínari um sosialistar, hevur villeitt lesaran. Nú roynir hon at byggja sínar pástandir á Klett. Við at blaða Halgubók frá permu úr permu, hevur hon funnið enn fleiri ondar maktir, nevniliga hesar:



Óndar maktir!

Eg eri ikki vanur at skriva lesarabræv og langar greinar, við tí fyri eyga, at læra onnur um hvat er rætt, og hvat er skeivt, ella hvat er gott og hvat er ónt. Tað er tað eingin, ella fá, ið hava evnir til, hóast so er, so eru tað fleiri, ið billa sær at koma við fremsta fingri og einvist dema »øðrvísi hugsandi«.

Hyggur ein í Dagbiaði nr. 131 mikudagin 11. nov. 87. so siggja vit, at ein av toppideologunum hjá fólkafl., Lydia Arge, við sínum viða sjónarringi, hevur funnið hellar tvær óndar maktir, sum vit eiga at vara okkum fyri.

Hon nevnir »Islams hvørs faðir er »Mohamed« og »sosialismuna« hvørs faðir er »Marx«. Nú er Islamiska læran 1417 ára gomul, so hvussu tað var áðrenn Islam, kunnu vit bert lesa okkum til. Men hvussu tað var áðrenn sosialisman varð sett í verk, av Lenin, fyri 70 árum síðani, eru tað nøkur ið minnast enn tann dag í dag. L.A. fortelur okkum hvussu hesar *ondu maktir*, við monnum sum Khomeini og Kadaffi øðrumegin og Lenin og Gorbatjov hinumegin, við hatri og kensluleyst, fremja yvirgang ímóti miljónunum av menniskjum. Eg eri so púra samdur við tær, í at hesir fremja yvirgang so tað forslar.

Men Lydia Arge, hondina á hjartað, um tú hevur nakað kennir tú bara hesar báðar óndu maktir.

Eftir myndini av tær, í Dagblaðnum 11 nov. at dema, er tú nóg gomul til at kunna minst og kent aðrar óndar maktir.

Minnist tú ikki Hitler, Mussolini, Francesco, ella Ponoche og Botha? Hava hesir ikki framt yvirgang ímóti miljónum av menniskjum? Vóru hesir mohamedanar ella sosialistar. Munnu hesir ikki hava hildið seg at havt eins reina samvitsku og Khomeini ella Gorbatjov.

Hvat vil Reagan og hansara kontrapartisanum í Nicaraca, ella hvussu nógvar milliónir hava ikki bløtt og framvegis liða yvirgang undir ti Bretska imperiunum.

Hví ávarðar tú ikki ímóti hesum óndu maktum, sum kallast Fasisma, Imperialisma, Kapitalisma og fyri ikki at gloyma Mammon. Sær tú nakran mun á hesum maktum, og teimum báðum tú ávarðar ímóti.

Her eru 4 óndar maktir. Ið eru eins sjónligar og hinar báðar eg minnist so sannliga eisini á sannleikan í E.f. 6.12.

Hvat við Satans makt, hon er mangan ósjónlig, og mær tykir at nakað av hesari makt liggur fjaid í grein tínari. Við tínari skriving og tínum sjónarmiðum, hómast ongin - *føroyska sosialistum* og vil als ikki vera lagdur undir slíkan óndskap - Orðatakið sigur at *stjóvur tryr at øll onnur stjala«*. Kanska at óndmenniskju halda at øll onnur eru ónd.

John Bertholdsen

heldur beiskur er tann, at tú nevndu grein millum annað sigur.

»Hóast sosialistiski internationali greitt fornoktar Gud, halda *okkara sosialistar fast við*, at á teirra *støði* byggir á Bíbliu og Kristindóm«. Eina aðra staðni stendur »Grimberg gevur ateistiska Marx hetta skoðsmál, hvørs læru *føroyskir sosialistar byggja sítt ástøði á*, lítið rósandi er tað. Og so kemur skoðsmálið.

»Marx er kensluleysur og svikaligur, hatskur, álitarleysur og skaðafrøður. Hugmóðligur og fullur av vanvirðing, markleysa sjálvkíkiur og ótøllynt.

Eg eri ein av *okkara*

vil als ikki vera lagdur undir slíkan óndskap - Orðatakið sigur at *stjóvur tryr at øll onnur stjala«*. Kanska at óndmenniskju halda at øll onnur eru ónd.

John Bertholdsen

Tá JB kennir sannleikan í EF. 6.12, er væntandi, at hann eisini hevur lisið aðrar sannleikar í Bíbliuni.

Tær átta óndu maktir, JB nevnir, eru jú alt ov fáar. Biblian lærir okkum um nógv fleiri, sum vit eisini kenna, um okkara samvitska enn er vakin.

Dømi eru: Lygnin, beiskleikin, vreiðin, øvundin, slaturin, útspillingin, óndа tungan, stríð, klandur, hatur, sjálvsøkni, hugmóð, ókærleikin, havisjúka, oyðsl, drykkjuskapur, skurðgudadyrkan bæði av mammon og persónum o.a.m.

Hesar ondu maktir ivast eg undrist á, at trúgvandi fólk stuðla politikki, sum greitt avnoktar Gud í eyðkennislagnum, Internationala (».. ei heldur Gud vit líta á..«)

Løgið, tey vilja ikki kennast við orðið kommunistar, sum var heitið á profetunum báðum í »Manifestinum«. Vanliga brúka kommunistar heitið sosialist um seg sjálvar og búskap sin.

Eg eri als ikki misnøgdur við greinarnar um Marx og Engel, tað er mær eitt feitt, hvat tú skrivar um hesar báðar. Les grein mína 12. des '87, so sært tú hvat eg eri misnøgdur við. Sjálvandi vilja vit ikki kennast við nakað vit ikki eru. Vilt tú? Annars kunnu profetarnir báðir brúka hvat heiti teir vilja.

Hann er gruggutur um tað, ið Grimberg skrivar um ateistiska Marx, hvørs læru føroyskir sosialistar byggja sítt støði á, Grimberg verður enntá endurgivin í lesarabrævinum.

JB svarar harmur aftur og vil ikki verða lagdur undir tann óndskap, Grimberg gevur Marx sum skoðsmál.

Kæri JB. Tað veri langt frá mær at rætta tað, Grimberg skrivaði í heimssøguni. hann er ikki á lívi longur, og ikki ber til at klaga fyri honum um søguáskoðan hansara.

Eftir Grimberg helt Erling Bjøl fram at finnast at tykkum »øðrvísi hugsandi«, sum tit so fegin vilja eita.

Nú sigur tú ósatt, eri als ikki gruggutur um tað Grimberg skrivar um ateistiska Marx.

Enn einaferð, les grein mína 12. des '87. At vera trúgvandi ella at vera ateist, hevði eg hildið vera persónligt, og ikki nakað ið sást á skræðuni, heldur í gerðum. Og at tú ikki vil rætta tað Grimberg skrivaði, skilji eg væl, tú vil heldur taka tað til tín og føra tað fram ímóti okkara sosialistum.

Eisini sigur tú ósatt, tá ið tú sigur at Erling Bjøl heit fram at finnast at okkum »øðrvísi hugsandi« sum í hesum førinum eru »føroyskir sosialistar«. Bjøl hevur ikki samanborið føroyskar sosialistar við ateistar og onnur bølmenni. At hann hevur funnist at sosialismuni, skal hann hava loyvi til, eisini tú.

Eftir at hava endurtikið papageyku-remsuna um Hitler, Mussolini, Franco, Pinochet, Botha, fascismu, imperialismu, kapitalismu o.s.fr., og so eisini mammon, skrivar JB.

Tá ið ein roynir at vísa á, at tað ongin munur er á, hvørt fólk vera pínd og dripin av Lenin og Khomeini ella av Botha og Pinochet, ja so verður hetta speiskliga kalla papageykuremsa, og gaman í. Vit kunnu eisini kalla remsuna um, kommunistar, ateistar, KGB